# - Vit koyra 50-60.000 kilometrar um árið






*- Til handbóltin skal eg hava góðar skógvar og til summarvenjingina góðar renniskógvar. Teir vil eg gjarna gjalda eitt sindur fyri*



umgangur. Men tað hendir seg, at øll familjan fer til Havnar at svimja, og tá skal ofta etast aftaná. Tá verður tað kortini ikki nøkur dýr matstova.

Eitt er hvat børnini krevja. Eitt annað er arbeiðið. Tá Ingi Olsen fer at keypa klæðir, er tað hampilig klæðir, ið egna seg til starvið.

- Í bankanum má eg vera hampiliga klæddur, og tí verður tað keypt javnt, sum er neyðugt. Eg kann ikki siga, at eg eri serliga mótatilvitaður. Men til handbóltin skal eg hava góðar skógvar og til summarvenjingina góðar renniskógvar. Teir vil eg gjarna gjalda eitt sindur fyri. Men tað er ikki so farligt við restini av venjingarklæðunum. Tað verður ofta bara til t-shirt og shorts.

Tá tað kemur til tøkniligu íløgurnar, vil Ingi Olsen ikki siga seg renna eftir tí nýggjasta og smartasta. Kortini finnast fleiri sjónvørp í húsinum. Genturnar hava eitt og dreingirnir eitt, og eitt stendur í stovuni. Ein flatskermur og tvey av gamla slagnum.

- Flatskermarnir eru so nógv praktiskari. Tá tað skal skiftast út aftur, verður tað heilt víst flatskermar, og teir kosta heldur ikki meir enn vanligu sjónvørpini. Teir taka einki pláss, og kunnu heingjast á veggin.

Fartelefonin er nýggj, men hana eigur arbeiðsplássið.

- Eg seti ikki nøkur serlig krøv til mína fartelefon. Hon skal bara vera góð til at arbeiða við. Heima havi eg eina góða teldu, og eitt fast internethald, sum umframt at vera hent, eisini vísir seg at vera neyðugt, tá mann hevur skúlabørn. Børnini lata allar uppgávur inn umvegis internetið, og konan, sum syngur við kórinum Sólarmagn, fær sínar sangir umvegis netið, sum hon so kann venja heima.

Børnini elska teldur, men tað er tilvitað, at tey ikki sleppa at spæla teldu allan dagin.

- Eg brúki nógva tíð til handbólt, men restina av tíðini raðfesti eg so høgt sum gjørligt til børnini. Gjarna, so eg kann venja tey á teimum liðum, tey eru á. Tað er eisini ein máti at vera saman uppá.

